

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 09 - 2012

# Fara ikki at bora við Norðpólin

Í síðstu viku gloppaði norski orkumálaráðharrin, Ola Borten Moe, dyrnar fyri, at Noreg fer at bora eftir olju norður ímóti Norðpólinum, men um vikuskiftið gjørdi Jens Stoltenberg, forsætisráðharri, greitt, at tað kemur ikki upp á tal. Tað var á ONS-oljumessuni í Stavanger, at Ola Borten Moe segði, at myndugleikarnir fara stigvíst at loyva oljuboring á nýggjum leiðum á norska landgrunninum, og at í hansara eygum gongur markið næstan norður til Norðpólin. Ráðharrin er úr Miðflokkinum, og orð hansara fingu øði í ein annan stjórnarflokk, Sosialistiska Vinstraflokkin, sum er harðliga ímóti oljuboring norðuri í Arktis. Umhvørvisverndarráðharrin Bård Vegar Solhjell, sum er úr SV, segði stutt, at hansara flokkur kann ikki vera í einari stjórn, sum borar eftir olju í Arktis. Men hetta ávirkaði eftir øllum at døma ikki orkumálaráðharran, tí í samrøðu við Stavanger Aftenblad dagin eftir segði Ola Borten Moe, hann vónaði at lata Stórtinginum eina leitiætlan fyri Arktis næsta ár. Men tað verður av ongum, sigur forsætisráðharrin. -Hesi viðurskiftini eru staðfest í tí lagda politikkinum, og oljuboring við Norðpólin er ikki partur av hesum politikki, segði Jens Stoltenberg við tíðindastovuna NTB leygardagin.